tíðindablaðið

# sosialurin

Nr. 105 mikudagur 7. juni 1995 | 69. árgangur | Krónur 7,00



# HB fór fram í oddin

*Við sigri á toftamonnum tryggjaðu havnarmenninir sær oddasessin í landskappingini*

***síðurnar 16, 17, 18, 19 & 20***

**ALLAN SIMONSEN KENNIR RESEPTINA:**

## Skotar spæla altíð á sama hátt

***síðurnar 13, 14 & 15***

***Ein møgulig bjarging av Fiskasøluni:***

# Uhrenholt keypir útlendska partin

*– Allir kredittir eru fult upptrektir í løtuni Vit tingast við kreditorarnar, men hvat tingingarnar snúgva seg um, kann eg ikki úttala meg um í løtuni, sigur Niels Sørensen, stjóri á Fiskasøluni*

Fiskasølan er í svarari kreppu og nógvar gitingar eru um, hvat fer at henda næstu dagarnar. Fiskasølan vantar pening í ólukkumát og nevnd og leiðsla knossast við at bjarga fyritøkuni.

Ein álítandi kelda, ið ikki ynskir at fáa navnið í blaðið, sigur við Sosialin, at ein loysn, ið arbeitt verður við í løtuni er at selja aktivini í Grimsby, herundir Chaldur. Selja partabrøvini í Hirtshals og partabrøvini í Havsbrún.

Keldan veit at siga, at áhugaverdasti keyparin er sjálvastu nevndarformaðurin, Uhrenholt.

Okkum hevur ikki eydnast at fáa hesi tíðindi váttað. Vit fingu ikki Uhrenholt á tal, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Men stjórin í Fiskasøluni, Niels Sørensen hevði hesa viðmerking.

– Allir kredittir hjá Fiskasøluni eru trektir for upp í løtuni, sigur hann.

*Er nøkur bjarging á veg?*

– Vit tingast við fullari ferð í løtuni og eg rokni við, at ein loysn fyriliggur um nakrar fáar dagar. Hvat hendan loysn gongur út uppá, kann eg als ikki úttala meg um í løtuni, tí so órógvi eg samráðingarnar, sigur Niels Sørensen.

*Selja tit nakran fisk í løtuni?*

– Vit selja ikki nógv júst nú, men tingingar fara fram. Vit vita heldur ikki um, at fiskur skal verða tikin í land aftur av farmaskipum í seinastu viku, sigur Niels Sørensen.

*Rídlar fiskasølan í løtuni?*

– Tað vil eg ikki úttala meg um nú, sigur Niels Sørensen.

Sosialurin visti undan Hvítusunnu at siga, at eginognin hjá Fiskasøluni var minus 30 milliónir krónur. Stóru kreditorarnir, Den Danske Bank og BRF vóru um at missa tolið við Fiskasøluni.

**jústinus**



# OLJULEITINGIN VIÐ FØROYAR BYRJAÐ



*»Atlantic Margin Group« er – sum fyrsta felag – farið undir veruliga oljuleiting undir Føroyum, og serlig lurtiútgerð er sett upp bæði á Streymoynni og Sandoynni. Hetta eru sokallaðar OBS-kanningar. Umframt er verða 50 mottakarar settir upp á havbotninum úr landi og heilt út á sjómarkið*

***Lesið á síðu 8***

